# Jarnbardur er fantastiskur

**Manningin á mest vinnandi bátinum seinastu árini vil ikki hoyra annað grett enn, at tær hava fokus á næsta róðrinum, sum tær fegnar vilja vinna**

NORÐOYASTEVNA 6-MANNAFØR KVINNUR

*Jóannes Hansen*



*Jarnbardur er framveigs í serflokki í føroyskum kvinnuróðri. Tann veruleikin varð aftur undirstrikaður á norðoyastevna*

*Mynd: Bár ður*

Úrslitini seinastu árini kundu boða frá, at kvinnurnar umborð á Jarnbardi ætla at gerast tann manningin, sum hevur vunnið flestar róðrar út í eitt. Men hetta er ikki nakað, sum tær hugsa um og tosa um. Tað undirstrika tær umborð á Jarnbardi staðiliga, tá ið tað verður spurt, hvussu leingi tær fara at tíma at kappast við seg sjálvar:

- Vit eru spentar og so nervøsar undan hvørjum róðri, sum tað er neyðugt at vera, um nakað skal spyrjast burturúr. Hvør róður er spildurnýggj kapping, og vit eru fullgreiðar yvir, at um vit ikki taka uppgávuna í alstórum álvara, so fer tað ikki at bera til at vinna, sigur Jannie Dam Jacobsen, sum aftur í ár er stýrimaður umborð á Jarnbardi, og sum eisini er formaður í Róðrarfelagnum Knørri.

Tær umborð á Jarnbardi hava nógvar kappróðrarroyndir. Manningin er næstan tann sama ár undan ári, men kortini fara onkrar av og aðrar koma umborð. At siga, at tær fara av, er kanska í so nógv at taka til, tí summar, sum koma umborð, hava verið við áður.

Í fjør vann Jarnbardur við kvinnum allar róðrarnar. Í fyrraárið vunnu tær tveir róðrar. Tá var báturin so at siga ikki mannaður. Fleiri rógvarar vóru niðri. Báturin luttók við skiftandi manningum, men tá ið so at siga orduliga manningin var komin umborð, vunnu tær á Vestanstevnu og á Ólavsøku. Í 2001 var Páll Fangi suverenur og vann allar róðrarnar, og í 2000 og í 1999 vann Jarbardur hvørja ferð.

Jannie Dam Jacobsen mynstraði við Jarnbardi í 1996. Síðani hevur hon verið við alla tíðina. Tað hevur Eivy Olsen eisini verið. Tó helt hon frí í 1998. Súsanna Skylv Sørensen kom við í 1997. Hon hevur verið við síðani, tó burtursæð frá 2003. Signhild Petersen hevur, síðani hon kom umborð í 2000, verið við alla tíðina, og Rannvá Jacobsen hevur róð við síðani í 2002.

Rannvá Eiriksdóttir er í ár komin umborð aftur. Hon var fyrstu ferð við í 1998. Síðani tá hevur hon verið burturfrá í 2002 og í 2004. Hildur Enni roynir seg í ár fyri fyrstu ferð sum partur av gullmanningini. Hon hevur áður róð við eitt nú Drekanum.

*Er tað nakar sum helst møguleiki fyri, at nakar annar bátur skal vinna í hesi kappingini enn tit?*

- Vit fara undir øllum umstøðum at gera okkara besta. So fæst at síggja, hvussu langt tað fer at bera. Riddarin var tvær bátslongdir aftanfyri okkum. Tað var tætt ímillum hann og teir báðar næstu bátarnar, so tað kann gerast spennandi, heldur Jannie Dam Jacobsen.

Tær umborð á Jarnbardi eru ikki komnar sovandi til úrslitini. Tær fóru undir venjingarnar stutt fyri jól. Umstøðurnar hjá teimum eru alt annað enn góðar. Neystið er avgjørt einki at reypa av. Knørrafelagið bíðar eftir svari frá býráðnum upp á umsókn um at byggja við síðuna av Havnar Róðrarfelag.

Í vetur vandu tær í leigaðum hølum í Saltsøluni, har tær saman við teimum umborð á Vágbingi hava vant á fimm rógvimaskinum.

- Vit brenna fyri kapproðrinum. Okkum dámar væl at venja, og sjálvandi er tað eyka hugaligt, tá ið tað gongst væl. Setningurin er hvørja ferð og alla tíðina at vinna næsta róðurin. Um vit detta í ta grøvina, at vit halda okkum hava vunnið frammanundan, so er tað heilt víst, at vit fara at tapa. Tí mugu vit hava fokus á rætta staðnum, og tað er í sær sjálvum stór avbjóðing, heldur Jannie Dam Jacobsen.

**Úrslit: 6-mannafør kvinnur**

| | |
|---|---|
| 1 Jarnbardur | 05:05.04 |
| 2 Riddarin | 05:10.01 |
| 3 Lómur | 05:11.20 |
| 4 Páll Fangi | 05:13.23 |
| 5 Sølmundur | 05:20.18 |
| 6 Gongurólvur | 05:28.22 |

# Gongurólvur aftur í rætta lagnum

**Eftir fleiri ár í skugganum tykist nýggj og stinn manning at skula bjóða av í FM kappingini, sum teir í HR í fjør vunnu bronsu í**

NORÐOYASTEVNA 6-MANNAFØR MENN

*Jóannes Hansen*



*Har var eingin sum helst ivi, tá Gongurólvur fór strúkandi fyrstur um málið*

*Mynd: Bárður*

Í fjør vóru marginalirnir ikki við monnunum umborð á Gongurólvi. Í tveimum teimum fyrstu kappingunum vóru teir næstfremstir. Onkra ferðina kiksaði tað heilt hjá teimum, men tá ið alt var samantalt høvdu teir vunnið bronsukrónurnar.

Undan hesum kappingarárinum hevur í Havnar Róðrarfelag verið roknað við monnunum umborð á Gongurólvi. Tað hevur eisini verið tosað um, at ungu menninir, sum eru 18-24 ára gamlir, skuldu taka sær av Havnarbátinum. Hetta varð nevnt sum møguleiki, tá ið tað ikki vóru serlig útlit fyri, at tað skuldi eydnast at manna 10-mannafarið.

Men teir umborð á Gongurólvi eru framvegis har, sum tað hevur verið roknað við, at teir skulu gera nógv um seg, og í fyrstu royndini livdu teir avgjørt upp til tað, sum tað hevur verið roknað við, at teir skuldu gera.

FM vinnarin í fjør, Sundabáturin, var roknaður sum favorittur undan Norðoyastevnuni. Tað varð Sundabáturin, tí hann á bygdarstevnuni á Strondum vann ógvuliga sannførandi. Í Klaksvík var talan um stórt vónbrot hjá Sundabátinum, sum endaði á fjórða plássinum. Starturin hjá Sundabátinum var einki serligur, og hann kom seg ongantíð. Men munurin var ikki serliga stórur. Frá Stráluni á sætta plássinum og fram til Jarnbard, sum hevur heilt nýggja manning, og sum endaði næstfremst, var ein stór hálv bátslongd.

Men Gongurólvur var so nógv fremstur. Hann var út ímóti tveimum bátslongdum frammanfyri Jarnbard.

- Starturin hjá okkum var heilt góður. Jarnbardur lá eysturi undir Kósalandinum, og vit vóru mitt úti á. Stýrimaðurin segði heilt skjótt, at vit vóru fremstir, og tað gav sinniliga yvirskotið, sum er so týdningarmikið, og sum ber eyka orku við sær. Vit vóru ikki á Strondum, tí vit hildu, at tað var í so stutt undan FM kappingini. Sjálvandi fylgdu vit við, hvussu tað gekk á Strondum, og tí høvdu vit roknað við kapping frá Sundabátinum og Jarnbardi, sum var nummar tvey á Strondum.

Tað er Sigtór Lützen, sum greiðir frá. Hann er bátsformaður umborð á Gongurólvi. 6-mannafarið hjá Havnar Róðrarfelag við monnum hevur ikki vunnið FM síðani í 1996. Avrikið í Klaksvík kundi bent á, at tað fer at eydnast í ár, sum teir høvdu vónað fór at eydnast í fjør, men sum ikki gjørdist til meiri enn nær við og næstan.

Manningin er væl fyri. Teir eru fimm við aftur í ár, sum eisini vóru við í fjør. Umframt bátsformannin Sigtór Lützen eru teir Sigfríð á Plógv Hansen, Jóan Pauli Lamhauge, Bergur Lützen og Símun Petersen. Nýggju menninir eru Steingrím Mikkelsen, sum ongantíð hevur róð áður, og so róðursmaðurin Jón Holm. Hann hevur verið róðursmaður seinastu tíggju árini ella so.

Hóast tað í fjør ikki gekk heilt, sum teir høvdu vónað umborð á Gongurólvi, so hava fleiri teirra áður royndt at vinna FM. Í 2002 vóru tríggir teirra við Sílinum, sum vann FM.

**Úrslit, 6-mannafør menn**

| | |
|---|---|
| 1 Gongurólvur | 07:24.03 |
| 2 Jarnbardur | 07:29.04 |
| 3 Sølmundur | 07:29.14 |
| 4 Sundabáturin | 07:30.14 |
| 5 Páll Fangi | 07:31.02 |
| 6 Strálan | 07:31.17 |
| 7 Víkingur | 07:34.06 |
| 8 Lómur | 07:37.14 |
| 9 Stjørnan | 07:41.22 |
| 10 Hósvíkingur | 07:43.03 |
| 11 Fuglfirðingur | 07:54.21 |
| 12 Kollfirðingur | 07:54.23 |